# HETTA ER



*2. A í kommunuskúlanum er her avmyndaður saman við landsstýriskvinnuni, tá útiskúli var á tímatalvuni seinasta týsdag. Aftast frá vinstru: Valborg, Niels Áki, William, Helena, Rebekka, Agnas, Ronja, Rókur, Per, Arni. Fremst frá vinstru: Martin, Finnur Meinhard, Ró, Jóna, Eyðfríð, Ási, Selma, Anna Kristina og Jón. Fremst í miðjuni: Poul Jóhann*

**MYNDIR:** HELENA DAM

TÁ **LANDSSTÝRISKVINNAN** Í MENTAMÁLUM **SLAPP** VIÐ Á **ÚTISKÚLA** HJÁ **2. A** Í TÓRSHAVNAR **KOMMUNUSKÚLA**, VAR HON HEILT **OVFARIN** AV TÍ, SUM **NÆMINGAR** OG LÆRARI FINGU **BURTUR ÚR** DEGNUM



**ÚTISKÚLI**

**Jákup Mørk**
post@sosialurin.fo

Týsdagurin 29. mars var ikki nakar heilt vanligur arbeiðsdagur hjá Helenu Dam á Neystabø. Snøggu og mótarættu klæðini, sum hoyra landsstýrissessinum og sjónvarpsskiggjunum til, vórðu eftir á hillini hendan morgunin, og ístaðin var farið í góð útiklæði, ið annars meira verða verða nýtt um kvøldarnar og um vikuskiftini. Tí hóast starvið er á skrivstovu, dámar landsstýriskvinnuni væl í náttúruni.

Tað var longu í umbúna, at vitjanir til ymsar verkætlanir innan fólkaskúlan skuldu gerast, og tá landsstýriskvinnan kom at sita undir liðini á Jón Kragesteen á fundi, har lærarar og landsstýriskvinnan vóru millum luttakararnar, var skjótt at gera eina avtalu



*Á ferðini verður bæði teknað og skrivað um tað, sum er at síggja. Her hevur Valborg okkurt forvitnisligt at vísa nýggja næminginum*

um, at 2. A skuldi hava ein nýggjan næming fyri ein dag.

Og illa kann sigast annað, enn at nýggi næmingurin var bergtikin av sínum skúladegi í gomlu Hoyvíkini, sum hesa ferð var útferðarmálið hjá flokkinum.

– Hetta var ein fantastiskur túrur. Og ikki minst var tað ótrúligt at síggja, hvussu engagerað og hugagóð børnini vóru.

– Vit gingu fyrst eina góða løtu, men longu her var sjónligt, at frálæran á ongan hátt varð løgd á hillina. Næmingarnir lósu millum annað upp vegaskeltini, sum vit gingu framvið, og tá vit so skuldu við bussinum til Hoyvíkar, skuldu tey sjálvandi duga at lesa seg